## Dagrøktari til Leirvíkar kommunu

Dagrøktarskipanin í Leirvíkar kommunu søkir eftir dagrøktara, at byrja tann 20.august 2007.

Vit ynskja, at tú
- Hevur góðar umstøður at hava børn bæði inni og uttanfyri.
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum.
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni.
- Ert tolin og vísir umsorgan.
- Hevur hegni og áhuga í at menna børnini.
- Dugir at síggja møguleikar í staðin fyri forðingar.

Í dagrøktarskipanini starvast 11 dagrøktara, ein námsfrøðingur í spælistovuni og ein leiðari. Talið av børnum í dagrøktini er 47.

Ein fastan dag um vikuna eru 3 dagrøktarar saman við børnum í spælistovuni og 1,5 tíma um vikuna eru allir dagrøktararnir ísenn við børnunum í fimleikarhøllini.

Arbeiðstíðin er ímillum 7.30 - 17.15. Lønin er sambært sáttmála við FA.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 443251 ella á 743251 og tosa við Marion Leifsdóttir, dagrøktarleiðara.

Leirvíkar Kommuna tilskilir sær rættin til at lýsa starvið av nýggjum um ov fáir umsøkjara eru.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19.juli 2007.

Vinarliga send umsókn tygara til.

**Leirvíkar Kommunu**
**Dagrøktarskipanin**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

NORMEK



## P/F Normek søkir eftir skrivstovufólki til at byrja 1. august

Arbeiði umfatar bókhald, lønarskipan, og telefon móttøku.

**Førleikar tínir:**
Dentur verður lagdur á, at tú ert fyrikomandi, ágrýtin og kanst arbeiða sjálvstøgu/r

**Løn:**
Lønin verður ásett eftir avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn saman við prógvum og ummælum til:

**P/F Normek**
Tróndagøta 63
FO-512 Norðragøta

og skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 25. Juli 2007.

Vilt tú vita meira kanst tú ringja á 582002, Erling Jacobsen

## Sands Skúli

# Lærarar

Lýst verður eftir 2 lærarum til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/2008 vegna avlopstímar og niðursetta tíð.

Tað eina starvið er fulla tíð, og hitt er uml. 12 tímar um vikuna.

Endaliga tímatalið verður sett í september.

**Søkt verður eftir lærarum sum m.a.:**
- Undir ábyrgd leiðslunar og í samstarvi við lærarir skúlans taka lut í dagliga virksemi skúlans
- Eru fús at taka á seg tær uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum.
- Eru við til áhaldandi at menna skúlan.
- Duga at samstarva.
- Kunnu átaka sær: ábyrgd av bókasavni, ítrótt/svimjing, danskt, enskt, heimstaðarlæru og telduundirvísing. Allar lærugreinar eru hjá 1. – 5. flokki.

**Førleikakrøv:**
Tey, ið sett verða, skulu helst hava læraraútbúgving.

Starvið verður lønt eftir avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18,1 – 27,4.

**Umsóknir:**
Umsóknir við viðmælum, avrit av prógvum o.ø. skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi hósdagin 26. juli. kl. 12.00.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlaleiðaran, Kristian Højsted á telefon 361623 ella 252854.

## Okkum tørvar fleiri starvsfólk

Til handil okkara í miðbýnum søknast vit eftir 2 fólkum at arbeiða 1/2 tíð.

Til handil okkara í sms er eisini tørvur á 2 fólkum 1/2 tíð.

Vinarliga støkk inn á gólvið við eini umsøkn.

Meira fæst at vita um størvini við at ringja 312225 í miðbýnum og í SMS tlf 315656

SKILLING

N. Finsensg. 23 • 100 Tórshavn • tlf. 31 22 25

## TVINGSILSSØLA YVIR ÚTRÓÐRARBÁT

Eftir áheitan frá Jóhan J. Lamhauge, advokati, Advokatfelagið við Strond 4, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260, verður hildin tvingsilssøla týsdagin, tann 4. september 2007, kl. 10.00, á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, (AS 2-16/2007) yvir útróðrarbátin

**»M/B Norðoyingur«**

ið Sp/f Norðoyggjafelagið undir konkurs er eigari av. Báturin hevur kenningsbókstavir OW 2073, og havnakenningsbókstavir KG 56. Báturin hevur fiskiloyvi í bólki 4A, og hevur í inniverandi fiskiári fingið tillutað 30 fiskidagar á landleiðini.

Báturin er smíðaður úr eik, bygdur í Rødvig í Danmark í 1973 og heimahoyrandi í Klaksvík. Báturin er merktur 21.2 brt.

Báturin verður seldur við tilhoyrandi útgerð, so sum tilhoyrandi nautiskari útgerð, línuspæli v.m.

Fyrireikandi fundur verður hildin á Dómaraskrivstovuni **týsdagin, 7. august 2007, kl. 10.30.**

Einhvør, ið heldur seg hava rættindi yvir bátinum ella møguligari útgerð, verður biðin um at møta.

Avrit av tvingsilssølutreytum kunnu fáast við at venda sær til advokat Jóhan L. Lamhauge.

Skjøl í sambandi við tvingsilssøluna liggja frammi til skoðan á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn.

***Føroya Fútarættur, tann 13. juli 2007***

**FØROYA HANDILSSKÚLI**

## VASKIFÓLK til Føroya Handilsskúla í Tórshavn

Vaskifólk til Føroya Handilsskúla í Tórshavn at byrjað 15. august 2007

Søkt verður eftir vaskifólki 18 tímar um vikuna. Vaskað verður í tíðarbilinum kl. 15.00 til 17.30.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til Zacharias Johansen, húsavørð tlf. 224693.

Løn sambært sáttmála hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Skrivlig umsókn, at senda til :

**Føroya Handilsskúla**
Postsmoga 177
110 Tórshavn

## Starvsfólk søkist

Søkt verður eftir pizzakokki og køkshjálp til at arbeiða í **Pizza+** og **Kondittarínum** sum skjótast.

**Áhugað kunnu ringja tlf. 28 45 45**